## Brúka teldur til próvtøkur

**Strendur:** Tá næmingar vóru til terminsroynd fyri jól í fjør, varð søga skrivað á Strondum: Hetta var nevniliga fyrstu ferð at næmingarnir brúktu teldu til eina slíka roynd. Stranda skúli (myndin) hevur gjørt stórar íløgur í teldutøkni, og er henda kostnaðarmikla útgerðin komin næmingunum til góðar. Skúlin hevur í mong ár givið næmingunum møguleika at brúka teldu til próvtøkuna í stíli. Nú hevur skúlin ikki so nógvar teldur, at hann kann útvega næmingunum eina í part. Skúlin hevur tí gjørt av, at til próvtøkuna hava næmingar sína egnu teldu við. - Henda skipan hevur riggað sera væl, helst nú, tá tey flestu kunnu útvega sær eina farteldu, sigur varaskúlastjórin, Petur Jákupsson.



# Fólk koma hvønn dag



*Tá Jona í Lon og hennara familja ikki fingu sodavatn og annað á Húsum, var skjótt at koyra norður til Trøllanesar at keypa í kioskini hjá Maud*

**Kioskin á Trøllanesi er hvørki stór ella prangandi, men her fær ein kortini alt tað, sum ein eigur at fáa á slíkum staði. – Fólk hava tikið sera væl undir við kioskini, sigur eigarin, Maud Østerø**

BYGDAMENNING

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Høgni Thomsen*

**Trøllanes:** Sjálvt í hesi norðastu bygdini á Kalsoynni kann tann vitjandi gerast stórliga bilsin.

Tann sjáldsama vakra náttúran og tað góða útsýnið má ein bara uppliva. Og at líta yvir hesa tøttu bygdina er somuleiðis ein sjón sum ein seint gerst troyttur av.

Men Trøllanes hevur nakað heilt annað. Nakað, sum ikki allar føroyskar bygdir hava. Nakað, sum fólk helst ikki vænta finst í eini so lítlari bygd við einans 22 íbúgvum – eina kiosk!

Visti ein tað ikki frammanundan, so fær ein í øllum førum tað greitt at vita, áðrenn ein kemur inn í bygdina.

Á fyrsta húsinum stendur nevniliga ein lítil plakat, sum greitt sigur: »KIOSK. Um tit ynskja at keypa, og kioskin er stongd, kunnu tit koma inn í Útistovu«.

Henda ísakalda mikudagin er kortini ikki neyðugt at fara inn í Útistovu eftir Maud. Ein bilur stendur beint uttanfyri kioskina. Tað er ein familja av Húsum sum er farin ein kiosktúr, hóast klokkan er ikki meiri enn farin av middegi.

Men tey høvdu vist sína orsøk til tað!

### Skúr til kiosk

Stóð ein kalsoyingur áður og manglaði ein pakka av sigarettum ella eina sodavatn á kvøldi, var ikki nógv annað at gera enn bíða til dagin eftir.

Seinasta summar fingu tey kortini ein møguleika at keypa særtærkioskvørurnar, sum teimum vantaði.

Hetta hendi, tá bóndakonan Maud Østerø á Trøllanesi lat upp eina kiosk í einum skúri, sum áður hevði verið ogn hjá Landsverki.

- Skúrurin stóð haruppi við tunnilin, og hevði áður virkað sum kontór hjá teimum. Nú ætlaðu teir at koyra hann burtur, men maðurin spurdi um vit ikki kundu fáa hann.

- Tað var í fínasta lagi. Hann kom oman higar, og so fóru vit at vaska og mála hann innan og seta hillarnar upp. Og so var bert eftir at keypa vørurnar inn og at lata upp, sigur Maud við brosi um varrarnar.

At byrja við var kioskin opin til klokkan 11 um kvøldið, men í vetur hevur hon verið opin ein hálvan tíma styttri.

Eingin ivi man kortini vera um, at tá tað fer at sumra aftur verður upplatingartíðina aftur longd til klokkan 11.

- Eri eg ikki í kioskini ella heima við hús, so veit altíð onkur í hvørjum húsum eg eri í. Hetta er ein fyrimununum við at hava ein kiosk í eini so lítlari bygd, sigur hon.

Umframt arbeiðið sum kioskdama er Maud bóndakona saman við manninum Bárður, og arbeiðir onkutíð á smoltstøðini í Knúsdali, sunnarlaga á Kalsoynni.

### Tugdi uppá tað

At Maud yvirhøvur lat upp hesa lítlu kioskina á Trøllanesi, kom fyri ein stóran part av ynskinum hjá bygdarfólkinum og fólkinum annars í oynni.

Í dag er ein handil á Húsum, og áður var møguligt at keypa ymiskt í grannabygdini Mikladal. Men í dag er bert handilin og henda kioskin á Trøllanesi í oynni.

- Tað eru fleiri sum hava sagt við meg, at tey saknaðu